tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 84 Hósdagur 2. mai 1996 | 70. árgangur | Krónur 7,00

## Statoil, Mobil Oil og Enterprise Oil:

# – Vit kunnu byrja at bora í 1997

*Tey liggja eitt ár framman fyri hini feløgini í kapprenningini eftir oljuni við Føroyar og lata sum tey fyrstu skrivstovu upp í Havn. Verða loyvini klár á sumri í 97, kunnu tey byrja at bora seinni í árinum*



*Lewis Murdoch frá Mobil Oil, Vidar Larsen frá Statoil og Halvor Snarvold frá Enterprice Oil til dystin fús. Teir kunnu byrja at bora eftir olju við Føroyar í 1997 og hava nú sett á stovn skrivstovu í Havn*
*Mynd Jan*

**Síða 6 og 12**

## Jóannes Poulsen, stjóri í Norðoya Sparikassa:

# Kreppan hevur verið ring, men hon hevur fingið fólk at hugsa



*Jóannes Poulsen, stjóri í Norðoya Sparikassa*

**Síða 10 og 11**


Nýggj fløga
frá Spælimonnunum
"Flóð og fjøra" fæst nu hjá Tutl.
Prisur........129:-
TUTL

*Geco Prakla fyri fyrstu ferð á føroyskum øki:*

# Ætla at fáa ungar føroyingar við

*Eitt av heimsins størstu seismikkfeløgum, Geco Prakla hevur nú tikið fyrsta stigið til at gera kanningar á føroyskum øki. Uppgávuna hevur tað fingið frá teimum trimum oljufeløgunum Statoil, Molbil og Enterprice. Men ein av stjórunum hjá felagnum útilokar ikki, at Geco Prakla verður nógv at síggja á føroyskum øki í framtíðini eisini. Leif Larsen ætlar sær nú at vita, um hann kann finna føroyingar at manna skip teirra*




*Geco My fyri fyrstu ferð á Havnini. Mynd: Áki Hermansen*

Jan Muller

Tíðliga mikumorgunin kom fyrrverandi týski trolarin og nú seismikkskipið Geco My á Havnina. Tað er stóra seismiska felagið Geco Prakla, sum eigur skipið og sum hevur fingið til uppgávu at gera seismiskar kanningar á føroyskum øki. Tað eru Statoil, Mobil og Enterprice, sum tey fyrstu oljufeløgini nakrantíð, ið hava tikið stig til eina seismiska kanning á føroyskum øki.

Talan er um at fara víðari við teimum kanningum, sum Western longu hevur gjørt og har við fáa meira at vita um undirgrundina í einum ávísum øki.

Tey trý oljufeløgini ætla so at brúka úrslitið av hesum kanningunum til at finna eitt stað, sum tey halda er mest hóskandi at bora í.

Fyri Geco Prakla, sum á sinni beyð uppá at gera seismiskar kanningar á øllum Føroyaøkinum fyri føroyskar myndugleikar, men sum ikki fekk ta uppgávuna, er tað sera kærkomið, nú oljufeløg fyri fyrstu ferð bíliggja eina kanning, at standa fyri henni.



*...an Mortensen, umboðsmaður fyri Geco Prakla væntar sær nógv av hesum ...elumtókta seismiska fel...gunum*

## Vilja geva føroyingum arbeiði

Hetta er ein av stjórunum hjá Geco í Noregi, Leif Larsen eisini sera fegin um.

Hann hevur hesi seinastu árini arbeitt í Malaysia fyri Geco og skal nú taka sær av eitt nú hesi seismisku uppgávuni við Føroyar.

-Vit eru sera fegnir um at hava fingið hetta arbeiðið og vóna, at tað verða aðrar nýggjar uppgávur í framtíðini eisini. Spurningurin er so eisini, um Geco av sínum eintingum fer at gera kanningar og selja feløgunum úrslitini. Tað vil tíðin vísa.

Leif Larsen sigur, at teir longu nú eru farnir at hyggja seg um í Føroyum fyri at finna fólk til uppgávur umborð á skipum teirra, sum koma at arbeiða við Føroyar.

Vit eru partur av stóru Schlumbergerkonsernini, og tað er hennara filosofi, at har arbeitt verður, skulu eisini fólk frá staðnum vera við. Eg fari tí at seta meg í samband við tykkara hægri skúlar og vita, um áhugi er at fáa arbeiði umborð á okkara skipum sigur hann.

Hann vísir á, at talan er um ymiskt slag av arbeiði og ikki minst tað, sum hevur við tøkniligu síðuna at gera umframt annað.

Vit seta fólk úr øllum londum og her umborð eru umboð fyri meira enn 10 tjóðir. Í gjár komu fólk við flogfarinum úr Bombay og Australia, so ein kann ímynda sær gongdina um eina tíð, tá fólk úr Føroyum fara til aðrar partar av knøttinum. Men sum sagt, m so royna vit at seta fólk í teimum londum, har vit meta uppgávur fara at liggja í framtíðini. Hesi fólk fylgja so sjálvandi við víðari, um tey vilja tað.

Í dag arbeiða 3500 fólk hjá Geco Prakla, sum hevur staðið fyri rættiliga nógvum kanningum á bretskum øki vestan fyri Hetland. Annars arbeiða teir kring allan knøttin.

Felagið eigur ikki færri enn 22 skip.

Leif Larsen vónar, at teir kunnu fáa eitt gott samstarv við føroyingar og heldur hann eisini, at føroyingar uttan iva kunna læra nógv av norsku royndunum í oljuvinnuni.

-Vit vilja so gera alt fyri, at tit kunnu gera brúk av okkara royndum.

### Umboðsmaður

Í sambandi við at Geco Prakla er farið at arbeiða í føroyskum øki hevur felagið fingið sær ein umboðsmann í Føroyum. Tað er Johan Mortensen, stjóri á Marr.

Johan Mortensen sigur í stuttari viðmerking, at tað er at fegnast um, at eitt so kent og vælumtókt felag sum Geco nú skal gera kanningar á føroyskum øki.

Hann heldur tað kann vera til stórt gagn fyri oljuleitingina við Føroyar, at eitt felag, sum hevur so nógvar royndir júst frá hesum leiðunum, verður við at gera tær seismisku kanningarnar. Í hesum sambandi minnir hann eisini á, at umframt Western, so var Geco eitt av teimum feløgunum, sum hevði eitt sera gott upplegg til at fara undir seismisku kanningarnar á Føroyaleiðini fyri tveimum árum síðani.



*Umborð á Geco My í gjár. Umboð fyri Geco Prakla, fyri tey trý oljufeløgini og fyri skipið. Mynd: Áki Hermansen*

Fríðka um húsini við
BECKERS
MÁLING
N. Finsensgøta 25 Tlf. 18181
Vit senda um alt landið

Skorsteinssóparin
Søla og uppseting av
REINSILÚKUM
ROYKHETTUM
Tlf. 22456 - 86458